# Føroysk sniðgeving í Hollywood

Tá Oscar-handanin herfyri var sýnd í sjónvarpinum, sótu milliónir av spentum hyggjarum kring allan heim framman fyri skíggjanum. Men tríggjar føroyskar kvinnur vóru serliga spentar. Anja Collin, Stefania Dam og Annfríð Hansen høvdu nevniliga seymað tríggjar av kjólunum, sum vóru at síggja á reyða teppinum í Hollywood. Tað var startskotið hjá føroysku sniðgevara trio'ini COLLINdamHANSEN



*Stefania, Linda og Annfríð, sum mynda COLLINdamHANSEN.*

*Mynd: COLLINdamHANSEN*

– Vit hava allar havt ein dreym um at byrja okkara egna merki í langa tíð. Men vit hava aldri tosað nakað serligt um tað, og tað var faktiskt rættiliga tilvildarligt, at tað kom í lag, greiðir Annfríð Hansen, ið er ein triðingur av sniðgevaratrio'ini COLLINdamHANSEN frá.

– Vit vóru samdar um, at tá vit so ofta høvdu trupulleikar at finna klæði, sum umboða júst okkara stíl, so máttu tað vera fleiri onnur, sum eisini høvdu tað. Og í januar gjørdu vit tí av í felag at fylgja dreyminum, sum vit hvør í sínum lagi høvdu havt so leingi.

**Seymaðu til Oscar-handanina**

Annfríð greiðir frá, at hon nakrar dagar eftir hesa avgerðina sá eina samrøðu við Julie R. Ølgaard, Lauru Christensen og Neel Rønholt í sjónvarpinum. Tær skuldu allar við til Oscarhandanina í Hollywood, tí stuttfilmurin "Om natten", sum tær spæla við í, var tilnevndur. Í samrøðuni søgdu tær, at tær ikki høvdu gjørt av, hvat tær skuldu fara í til handanina.

– Eg gjørdi skjótt av og sendi teimum mail um, at vit í COLLINdamHANSEN vóru sera áhugaðar í at gera teimum kjólarnar. Og tær takkaðu. Tað var fantastiskt, tí tað vóru fleiri onnur kend, donsk merki, sum eisini bjóðaðu seg fram. Okkara merki var ikki so frægt sum endaliga stovnað, greiðir Annfríð frá.

Hon ásannar, at tær hava verið óvanliga hepnar.

– Vit vita, hvussu torført tað er at fáa eina slíka uppgávu, tí tað eru so nógv um boðið. Og so at fáa hana sum sína allarfyrstu uppgávu – ja, tað er heilt óveruligt.

Hetta var fyrsta sniðgevara-uppgávan, sum Annfríð, Anja og Stefania í felag átóku sær, og tær høvdu bert tríggjar vikur til at sniðgeva, finna toy, seyma royndarkjólar, seyma veruligu kjólarnar, umframt at passa kjólarnar til. Annfríð viðgongur eisini, at tað vóru nógvar svøvnleysar nætur.

– Alt arbeiðið var gjørt í tøttum samstarvi við tær tríggjar sjónleikarinnurnar. Okkara hugsan er nevniliga, at tá tú skalt hava ein galla-kjóla, skalt tú hava møguleika at seta tín egna dám á kjólan. Tað skal vera sum at fara til frisør, har tú sama við frisørinum finnur útav, hvussu endaliga úrslitið skal vera. Og tað eydnaðist sera væl, staðfestir Annfríð.

Men skoðbráðið var knapt, og tað var ikki meir, enn tær megnaðu at fáa alt liðugt til tíðina. Tær arbeiddu líka til allarseinastu løtu, og ein av kjólunum var ikki latin eigaranum fyrr enn úti í Kastrup –bert fáar løtur áðrenn flogfarið til Hollywood fór á flog.

**Flúgvandi byrjan**

Síðani Oscar-handanina hava COLLINdamHANSEN fingið fleiri bíleggingar bæði til galla- og brúðarkjólar. Tær eru somuleiðis farnar undir at gera eina kollektión, sum er ætlað kvinnum í aldrinum 20-50 ár. Tær umhugsa harumframt eisini at fara undir eina kollektión av barnaklæðum. Framvegis hava bæði Annfríð, Stefania og Anja fulltíðarstarv ella – lesnað við síðuna av COLLINdamHANSEN. Og so eiga tær allar børn –tvær teirra eru einligar mammur. Tað er ilt at síggja, hvussu tað ber til at fáa alt at hanga saman.

– Nú hava vit valt at satsa uppá hetta, og vit hyggja heldur at málinum enn at forðingunum. Tá tú veruliga brennir fyri nøkrum, so er tað gleðin sum drívur verkið, og tí gerst tað ikki so strævið, hóast tú hevur nógv um at vera, staðfestir Annfríð.

– Men, leggur hon afturat, – eg fari væntandi skjótt niður í hálva tíð á salongini, so at eg kann arbeiða hálva tíð fyri COLLINdamHANSEN, og tað fara Anja og Stefania somuleiðis at gera, greiðir Annfríð frá.

**Ynskja íleggjarar**

Men hóast byrjanin hevur verið góð og dreymarnir eru stórir, so taka tær tríggjar bert eitt stig í senn.

– Í fyrstuni ætla vit at gera kollektiónir, sum vit taka myndir av og leggja út á heimasíðu okkara. Har kunnu fólk bíleggja sær tey pløggini úr kollektiónini, tey vilja, og so seyma vit tey so hvørt. Harumframt ætla vit at seyma galla- og brúðarkjólar eftir umbøn. Tað verður altso ein "her-og-nú" framleiðsla, tí sum er, hava vit ikki fíggjarliga orku til at gera, sum man plagar innan mótaheimin, staðfestir Annfríð.

Hon sipar til, at flestu sniðgevar framleiða eina kollektión hálva hvørt ár,



*Mynd: Tina Jøhnk Christensen, Alloverpress*